# Grundspælið endar



*Vestmenningar hava helst ikki ráð at kiksa, tá teir vitja H71 í seinasta dystinum í grundspælinum*

**Tey seks mansliðini fara sunnudagin undir seinasta partin av grundspælinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hondbóltsbarometrið í Hoyvík hevur verið í botni seinastu vikurnar, og sunnudagin stendur so aftur ein trupul uppgáva fyri framman.

Tá kemur VÍF, sum saman við Kyndli myndar oddin, á vitjan. Fyrra uppgerðin millum liðini var sera jøvn, og ta ferðina var um reppið, at hoyvíkingarnir struku avstað við stigum, men í evstu løtu eydnaðist tó VÍF at taka sítt.

Síðani hava formkurvarnar tó verið heldur ymiskar. Hóast VÍF ikki hevur bast Kyndli, so hava teir hildið eitt gott tak í oddinum, og einki er at ivast í, at teir eisini vilja enda grundspælið á bestan hátt. Og tað vil siga við einum sigri.

Samstundis skal Kyndil royna at hevna seg inn á kollfirðingar, sum mest sum tjóvstartaðu landskappingina, tá teir í fyrsta umfarinum vunnu á Kyndli. Skulu avrikini higartil takast sum útgangsstøði, so er einki at ivast í, at Kyndil eigur at vinna ein syngjandi tryggan sigur. Bæði liðini hava tó sýnt rættiliga svingandi spæl í heyst, og sum úrslitið frá fyrra dystinum sigur, so standa allir møguleikar opnir, so leingi sum dysturin ikki er spældur.

Seinasti dysturin hesaferð stendur millum StÍF og Neistan. Her hevur StÍF havt eina góða framgongd seinastu vikurnar, og kunnu teir eisini enda grundspælið við einum sigri, fer lagið um Skálafjørðin helst at vera heilt gott.

Neistin hinvegin hevur upplivað hópin av vónbrotum higartil í ár. Somikið illa hevur skorist, at teir nú eisini hava gjørt flytingar í venjarasessunum, og so er spurningurin, hvørt tað fer at ganga betri, nú Damir Oros bert skal hugsa um tað, sum fyriferst inni á vøllinum.

# Enskur áhugi fyri HB-leikara

**Enska Premier League felagið, Manchester City, hevur sýnt áhuga fyri Christian R. Mouritsen**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Ein av ungu føroysku fótbóltsleikarunum, sum í heyst gjørdi nógv um seg á føroyska U-17 landsliðnum, var Christian R. Mouritsen úr HB.

Fótbóltsevnini hava leingi verið eyðsýnd, og góðu avrikini á altjóða pallinum hava avgjørt borið við sær, at útlendski áhugin eisini hevur verið til staðar. Soleiðis var hann fyrr í ár í enska Everton til venjingar, og fyri stuttum hevur hann aftur verið í Onglandi. Hesa ferð hjá Manchester City.

Og nú ljóðar, at enska felagið hevur ein veruligan áhuga í at knýta unga leikaran til talent-hópin hjá sær. Og hetta verður so heldur ikki avsannað í HB, sum enn hevur leikaran í felagnum.

– Tað er eingin loyna, at Christian er ein spennandi leikari. Tá hann var í Everton, lótu tey eisini væl at honum, og áhugi var eisini í, at hann skuldi koma aftur at venja, sigur Birgir Enghamar, formaður í HB.

– Tað bleiv so ikki til nakað í fyrsta umfari, og tað er helst eingin loyna, at tað síðani hevur verið ávísur dialogur við Manchester City um leikaran, men enn er tó alt ov tíðliga at staðfesta, hvat spyrst burturúr hesum. Kemur tað hartil, so er talan um ein spurning, har vit í HB, enska felagið og ikki minst leikarin sjálvur skulu semjast um nakrar treytir, og hartil eru vit so als ikki komin enn, sigur Birgir Enghamar.

Tað er NAFA við Jákupi í Stórustovu, sum umboðar Christian R. Mouritsen, men í verandi støðu vil umboðsmaðurin ikki gera stórvegis viðmerkingar til málið.

– Tað er jú kunnugt, at Christian hevur verið í bæði Everton og Manchester City til venjingar, og tær hava gingið væl. Men annað enn tað fái eg ikki sagt í løtuni, er einasta viðmerkingin, sum Jákup í Stórustovu hevur um málið.

## Hondbóltsstøður

SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

| | dystir | v - j - t | v. mál | t. mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 9 | 7 - 0 - 2 | 277 | 191 | 86 | 14 |
| 2 VB | 7 | 6 - 0 - 1 | 214 | 142 | 72 | 12 |
| 3 Stjørnan | 6 | 6 - 0 - 0 | 163 | 123 | 40 | 12 |
| 4 Søljan | 9 | 5 - 0 - 4 | 260 | 219 | 41 | 10 |
| 5 VÍF | 9 | 5 - 0 - 4 | 218 | 197 | 21 | 10 |
| 6 StÍF | 8 | 1 - 1 - 6 | 167 | 212 | -45 | 3 |
| 7 Kyndil | 8 | 1 - 1 - 6 | 152 | 229 | -77 | 3 |
| 8 Tjaldur | 8 | 0 - 0 - 8 | 146 | 284 | -138 | 0 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN
MENN

| | dystir | v - j - t | v. mál | t. mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 9 | 7 - 0 - 2 | 281 | 220 | 61 | 14 |
| 2 VÍF | 9 | 7 - 0 - 2 | 265 | 229 | 36 | 14 |
| 3 H71 | 9 | 4 - 0 - 5 | 267 | 263 | 4 | 8 |
| 4 KÍF | 9 | 4 - 0 - 5 | 223 | 244 | -21 | 8 |
| 5 StÍF | 9 | 3 - 0 - 6 | 239 | 272 | -33 | 6 |
| 6 Neistin | 9 | 2 - 0 - 7 | 237 | 284 | -47 | 4 |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 8 | 7 - 1 | 22 | 7 | 15 | 14 |
| 2 TB | 8 | 7 - 1 | 21 | 8 | 13 | 14 |
| 3 KÍF | 8 | 4 - 4 | 13 | 15 | -2 | 8 |
| 4 Dráttur | 8 | 3 - 5 | 16 | 17 | -1 | 6 |
| 5 ÍF | 8 | 3 - 5 | 11 | 15 | -4 | 6 |
| 6 SÍ | 8 | 0 - 8 | 3 | 24 | -21 | 0 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 7 | 6 - 1 | 19 | 7 | 12 | 12 |
| 2 Mjølnir | 7 | 5 - 2 | 17 | 9 | 8 | 10 |
| 3 Fleyr | 7 | 4 - 3 | 15 | 11 | 4 | 8 |
| 4 ÍF | 6 | 1 - 5 | 5 | 16 | -11 | 2 |
| 5 Fram | 7 | 1 - 6 | 6 | 19 | -13 | 2 |

# Mjølnir og Fleyr nærkast

SÍ heldur frí um vikuskiftið, og ivaleyst stíla bæði Fleyr og Mjølnir eftir stigum

Í Havn skal Fleyr spæla grannauppgerð móti Fram. Einki er at ivast í, at Fleyr eru stórfavorittar til at vinna tann dystin, og tað skal vilja meira enn illa til, megna teir ikki at liva upp til hetta.

Í Klaksvík fær Mjølnir vitjan av ÍF, og heldur ikki har er væntandi, at stórvegis ivi verður um úrslitið. Hóast sigurin seinasta vikuskifti, so er framvegis langt frá ÍF og til ovaru trý liðini, og tann munurin verður helst enn einaferð staðfestur leygardagin.

-jm

# Odda-liðini á heima-vølli

Heldur ikki hjá kvinnunum tykist stórvegis spenningur vera um dystirnar hetta vikuskiftið.

Í Klaksvík fáa kvinnurnar hjá Mjølni eisini vitjan av ÍF. Tað høvið vilja tær á heimaliðnum helst nýta til at prógva, at talan var um ein kiksara móti TB herfyri, og soleiðis sum stigatalvan nú sær út, so hevur Mjølnir heldur ikki ráð til at missa nakað.

TB skal sunnudagin royna seg á heimavølli, tá SÍ kemur á vitjan. Enn hevur SÍ so ikki fingið nakað stig, og tað skal helst undir ongum umstøðum roknast við, at tey fyrstu koma til høldar á útivølli móti liðnum, sum hóttir við at skumpa Mjølnir til viks av flogbóltstrúnuni.

-jm